# Leiðari til Dagstovnin við Botnánna

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara at arbeiða 40 tímar um vikuna, at byrja 1. sept. 2009.

Í barnagarðinum eru 20 børn í aldrinum 5 til 7 ár og í frítíðarskúlanum 22 børn.

**Vit bjóða**

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum, og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving og eftirútbúgving
- tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarar

**Vit vænta at tú**

- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemið á einum stovni, ið rúmar bæði barnagarðs- og frítíðarskúlabørnum
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, telefon 30 20 10.

**Umsókn**

saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera hjá Tórshavnar kommunu, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 30. juni 2009.



Tórshavnar kommuna



# Hevur tú handilstalent?

– handilslærlingur til Svend Krosstein

**Hevur tú hug til handil, so hava vit pláss fyri einum lærlingi (m/k) í fyritøku okkara.**

Vit bjóða tær eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú verður partur av einum góðum toymi og sært góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár, og til at fáa starvið krevst HH- ella FHS-prógv. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við S & K. Starvið verður sett eftir avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, ert tú vælkomin at senda eina umsókn við prógvum og viðmælum til:

P/F Svend Krosstein
Postboks 3229
FO-110 Tórshavn
Viðm.: Læurupláss

Umsóknarfreistin er 1. juli 2009.

**Meira at vita?**
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Anniku Krosstein, stjóra, tlf. 34 46 02, ella til Jógvan Magnussen, handilsleiðara, tlf. 34 46 16.

*P/F Svend Krosstein er ein fyritøka í støðugari menning og hevur í løtuni 17 fólk í fulltíðarstarvi. P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta HVS-handil í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveiting, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.*

SENDISTOVAN

SVENDKROSSTEIN

Pf. Svend Krosstein • Falkavegur 6 • Postboks 3229 • FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 • Fax +298 344 601 • www.krosstein.fo • krosstein@krosstein.fo

www.taks.fo

TAKS

## Kunning um broyting í lóg um arbeiðsmarknaðareftirløn

Hendan kunning er serliga viðkomandi hjá persónum, sum eru búsitandi aðrastaðni enn í Føroyum, og sum hava vunnið rætt til eftirløn úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er broytt.

Lógarbroytingin kemur í gildi 1. juli 2009.

Lógarbroytingin merkir, at persónur, ið lýkur niðanfyristandandi krøv, hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið, sum hann hevur verið búsitandi í Føroyum, tó í mesta lagi 40 ár.

**Krøv:**
- Hevur fylt 67 ár.
- Hevur í minst trý ár, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal, havt fastan bústað í Føroyum og verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum.

**Umsókn um arbeiðsmarknaðareftirløn**

Persónar, sum lúka nevndu krøv, og sum í dag eru búsitandi aðrastaðni enn í Føroyum, fáa bert eftirlønina veitta eftir umsókn.

Persónar búsitandi í Føroyum, nýtast ikki at søkja um at fáa eftirlønina útgoldna.

Umsóknarblað AM02 fæst á heimasíðuni hjá TAKS www.taks.fo, undir "Oyðubløð" ella við at venda sær til TAKS 35 26 00